

Finn Lied. Mynd: Teknisk Ukeblad

# Ráðharrin sum fekk gongd á Statoil er deyður

**Jógvan Hugo Gardar**

12.10.2014 - 17:02

Oljan.fo

Seinnapartin komu boð úr Noregi um at Finn Lied er deyður, 98 ára gamal. Hann andaðist fríggjamorgunin.

Í dag vita sjálvt í Noregi tey flestu ikki hvør Finn Lied var, men millum oljufólk og tey sum hava fylgt við í menningini av norska vinnulívinum síðani fyrst í sjeytiárunum var Finn Lied ein maður man lurtaði eftir. Hann gjørdi ongantíð nógv burturúr sær, men hann kom javnan við innspølum og meiningum í orðaskiftið, serliga tá talan var um olju- og gasspolitikk.

Finn Lied var granskingarstjóri, ráðharri og ikki minst var hann nevndarformaður fyrstu árini Statoil var til.

Finn Lied var ídnaðarmálaráðharri í fyrstu Arbeiðaraflokk-stjórnini hjá Trygve Bratli, frá mars 1971 til oktober 1972. Hetta árið hann sat sum ráðharri brúkti hann millum annað til at leggja lunnar undir Statoil, og skrivarin hjá honum, Arve Johnsen, gjørdist fyrsti stjórin í Statoil. Sjálvur bleiv Finn Lied valdur sum nevndarformaður í Statoil í 1974, og sat í hesum sessinum til 1984.